## Gentur útbúgva seg meira

**Dreingirnir vilja verða kokkar og timburmenn. Genturnar vilja verða læknar og advokatar.**

ÚTBÚGVING
*www.business-line.fo*

Tá tey ungu í donsku 8. og 9. flokkunum skulu peika á teirra dreymaútbúgving, er stórur munur á, hvat kynini velja.

Genturnar ynskja í nógv størri mun enn dreingirnir at halda fram í útbúgvingarskipanini og stíla eftir longum útbúgvingum. Tað vísir ein kanning hjá Center for Ungdomsforskning ved Learning Lab Denmark á Danmarks Pædagogiske Universitet.

Hjá dreingjunum er støðan ein onnur. 15% av teimum ynskja at fara úr 9. flokki og finna sær okkurt arbeiði. Fyri genturnar er hetta talið 9%.

Útbúgvingarynskini hjá teimum ungu í 9. flokki broytast ofta, áðrenn endaliga valið fer fram. Nógvir næmingar hava onga hóming av, hvat tey ætla sær seinni.

Í miðnámsskúlunum eru kvinnurnar í dag í stórum meirluta, og á lærdu háskúlunum eru tað eisini flestar kvinnur, ið taka útbúgvingar innan læknavísindi, løgfrøði og samfelagsfrøði.



*– Arnbjørn Fagraklett er byrjaður í tí smáa heima hjá sær sjálvum í Vági. Her setir hann eina hitapumpu upp, sum hitar um veturin og kølir um summarið. Hann hevur eisini nógvar aðrar, alternativar vørur á skránni*

# Handilsmaðurin í Suðuroy við teimum bíligu alternativunum

**Í hesum framkomnu tíðum ger tað ikki mun, hvar handilin er, sigur Arnbjørn Fagraklett, sum er farin undir nýtt virksemi í Suðuroy**

HANDILSSKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Nú eru teknikkurin so frammarlaga, at tað ger ikki mun, hvar tú ert staddur. Tí kunnu vit akkurát tað sama verða í Suðuroynni, sum onkra aðrastaðni í landinum.

Tað sigur Arnbjørn Fagraklett, nýbyrjaður handilsmaður.

Hann letur seg sostatt ikki ávirka av neiligu páhaldunum um at tað ber so illa til at hava virki og fyritøkur í Suðuroy, tí oyggin er so langt frá meginøkinum, Smyril er altíð lagdur av arbeiðssteðgum og flutningurin er so dýrur.

Hann sigur, at nú á døgum eru samskiftismøguleikarnir so góðir, at tað ger ikki mun, hvar ein er staddur og stinga onkrir trupulleikar seg upp, er bara at taka teir við.

Og trupulleikar fekk hann beinanvegin, tí longu tann dagin, hann fekk tær fyrstu vørurnar heim, varð Smyril lagdur av arbeiðssteðgi, so byrjanin var onki serligt.

Men tíbetur sigldi gamla Johanna, so vøran kom fram kortini.

So tá ið hann fekk eitt gott hugskot helt hann, at hann kundi akurát tað sama byrja í Vági, hagar hann er fluttur.

Sostatt eru hann og sambúgvin, Solveig Ryggshamar, farin undir handilin við tí ambitiøsa navninum, "Sparpengar".

Og tað er júst annað beinið, sum handilin byggir á, nevniliga, at her er peningur at spara. Arnbjørn tvíheldur um, at tað, sum hann selir, skal ikki kosta meiri enn umleið helvtina av tí, vit eru von við.

Tað kann hann gera, tí at hann ætlar at halda útreiðslunum so langt niðri sum gjørligt. Goymslan verður heima í kjallaranum, men tað hevur so eisini merkt heimið vesturi við Vatnið í Vági, har kjallarin er fullur av pappeskjum.

Og sjálvari avgreiðsluni ætla hann og Solveig at taka sær av.

Tað ger eisini sítt til at halda prísunum niðri, at hann er komin uppí eitt norðurlendskt samtak, sum keypir vørur heim í stórum mongdum, beinleiðis frá framleiðarunum.

Arnbjørn Fagraklett sigur, at talan er um kinesiska framleiðslu, har framleiðslukostnaðurin er nógv bíligari enn vit eru von við og tað hjálpir avgjørt upp á prísleguna.

Men hvørjir trupulleikar, ið kunnu standast av at byggja vinnu upp í Suðuroy, fekk hann beinanvegin at merkja, tí longu tann dagin, hann fekk tær fyrstu vørurnar heim, varð Smyril lagdur av arbeiðssteðgi, so byrjanin var onki serligt.

Men tíbetur sigldi gamla Johanna, so vøran kom fram kortini.

### Alternativar vørur

Men tað skerst heldur ikki burtur, at vøruúrvalið er eitt sindur serligt, tí talan má milt sagt sigast í stóran mun at vera um alternativar vørur.

Hann er byrjaður at selja hitapumpur til virkisbygningar og vanlig sethús. Umframt at hita hølini upp um veturin og kunnu tær køla niður um summarið, um tað gerst ov heitt.

Seinni koma eisini hitapumpur, sum kann koplast beinleiðis til miðstøðuhitan og sum eisini syrgir fyri heitum vatni.

Og hevur onkur droymt um eitt prutl ella ein skutara, sum ikki brúkar bensin, men sum gongur við el-orku, fer tað eisini at lata seg gera seinni.

– Umframt at halda prísunum niðri, er endamálið við hesum eisini at spara olju og sostatt eisini at dálka minni. Eftir fólkatalinum eru Føroyar heimsmeistarar í luftdálking frá olju og tí eiga øll tiltøk, sum kunnu spara olju, at vera vælkomin.

Men seinni koma eisini sjónvørp við flatskermi og allari nýggjari tøkni, umframt mp4 spælarar, sum eru ein víðarimenning av teimum betri kendu mp3 spælarunum.

Men skuldi brúk verið fyri einum elektriskum koyristóli, fer eisini tað at bera til.

Hann sigur, at av tí at talan er um ókendar framleiðslur, tekur tað eitt sindur av tíð at fáa fólk at góðtaka tey, tí tey vilja heldur halda seg til tað, sum tey kenna og tað skilir hann væl.

– Men kinesarar duga sanniliga eisini og dygdin er fult á hædd við aðra framleiðslu. So tað mann fara at koma, heldur hann og hann kann ikki klaga um gongdina higartil.